**Meistaradeild kvinnur**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 16 | 15 | - | 1 | 47 | 10 | 37 | 19 |
| 2 ÍF | 16 | 14 | - | 2 | 44 | 17 | 27 | 18 |
| 3 Dráttur | 16 | 10 | - | 6 | 36 | 26 | 10 | 12 |
| 4 Mjølnir | 16 | 7 | - | 9 | 27 | 33 | -6 | 9 |
| 5 KÍF | 16 | 6 | - | 10 | 27 | 32 | -5 | 7 |
| 6 TB | 17 | 5 | - | 12 | 22 | 39 | -17 | 7 |
| 7 Fleyr | 17 | 0 | - | 17 | 5 | 51 | -46 | 0 |

**Meistaradeild menn**

| | | | | | vunnin | tapt | sett- | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|

**Hondbóltur**

SUNSET KAPPINGIN KVINNUR

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 18 | 16 | - | 1 | - | 1 | 535 | 404 | 131 | 33 |
| 2 VB | 18 | 10 | - | 2 | - | 6 | 423 | 391 | 32 | 22 |
| 3 Neistin | 18 | 11 | - | 0 | - | 7 | 441 | 426 | 15 | 22 |
| 4 Kyndil | 18 | 7 | - | 1 | - | 10 | 417 | 462 | -45 | 15 |
| 5 StÍF | 18 | 5 | - | 1 | - | 12 | 406 | 441 | -35 | 11 |
| 6 VÍF | 18 | 2 | - | 1 | - | 15 | 388 | 486 | -98 | 5 |

ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN MENN

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 StÍF | 18 | 14 | - | 1 | - | 3 | 534 | 418 | 116 | 29 |
| 2 Neistin | 18 | 12 | - | 1 | - | 5 | 514 | 470 | 44 | 25 |
| 3 Kyndil | 18 | 10 | - | 1 | - | 7 | 486 | 484 | 2 | 21 |
| 4 H71 | 18 | 6 | - | 2 | - | 10 | 450 | 462 | -12 | 14 |
| 5 VÍF | 18 | 6 | - | 2 | - | 10 | 476 | 510 | -34 | 14 |
| 6 KÍF | 18 | 2 | - | 1 | - | 15 | 423 | 539 | -116 | 5 |

# Rørandi søgan hjá ísraelsku Grant-ættini

**Pápi Chelsea-venjaran, Meir Grant, var tann einasti í ættini, sum yvirlivdi Holocaust**

FÓTBÓLTUR

*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Tann fyrsti Avram Grant varð jarðaður av soni sínum Meir Grant í einari russiskari skóg undir seinna veraldarbardaga. Hesin Avram Grant varð jarðaður saman við konuni og fimm børnum. Tey royndu at flýggja undan nasistunum, men nasistarnir fingu tey aftur, og skutu tey til deyðis. Tann einasti, sum yvirlivdi, var pápi tann Avram Grant vit kenna í dag, Meir Grant. Meir flýggjaði til Ísraels tá kríggið var liðugt. Har giftist hann Alizu, sum var irakiskur jødi. Tey búsettu seg í Petach Tikva, og tað var har, núverandi Chelsea-venjarin Avram Grant var føddur 6. juni í 1955.

### Hatar kulda

Meir Grant vil ikki vitja sonin í London:

- Tað er ov kalt, og kuldi er ein av teimum fáu tingunum eg ikki haldi út. Kuldin situr í sálini og í kroppinum frá tí tíðini, tá vit flýggju undan nasistunum, tá vit flýggjaðu úr Póllandi og til eina risastóra skóg í Russlandi. Har royndu vit at byggja eina smáttu í 40 kuldastigum, og stríddust fyri bara at yvirliva. Vit búðu rættiliga norðanliga, tí har var ongantíð myrkt um summarið, og ljóst um veturin. So eg klári ikki kulda!

Minnini sita føst í Meir Grant. Avram Grant er sjálvur merktur av líðingini hjá Grant-ættini:

- Tað flestu í familju mínari blivu dripin undir Holocaust hjá Hitleri. Eg skilji ikki, hvussu ein maður, sum hevur upplivað so nógvar ræðuleikar á foldum kann verða so bjartskygdur. Tá hann var 15 ára gamal hevði hann jarðað síni foreldur og síni systkin við sínum beru hondum, Hevur Avram Grant sagt í djúpari virðing fyri pápa sínum.

### Mamman hataði fótbólt

Mamma Avram, Aliza Grant, vildi hava, at hann skuldi gerast sakførari, og mótsatt pápanum orkaðu hon ikki fyri fótbólti.

- Kona mín var ógvuliga snarsint, tá hon frætti, at Avram heldur vildi gerast fótbóltsyrkisleikari, enn at fara og lesa til sakførara ella lækna, soleiðis sum hon ynskti Avram skuldi gera. Tá gjørdi hon ikki mætari, enn at hon fór eftir einum knívi og kruvdi bóltin hjá honum.

Dreymurin hjá Avram at gerast yrkisleikari brast aftaná eina keðiliga ferðsluvanlukku. Men hann valdi so tíðliga at gerast fótbóltsvenjari, og væl hevur gingist. Nú stjórnar hann Chelsea.

### Deildar meiningar

Tað eru deildar meiningar um Avram Grant, sum verður mettur at verða ein stillur, sterkur og treiskur venjari. Men summi meta Grant at verða eirandaleysan og kynsiskan. Liverpool-leikarin Yossi Benayoun heldur nógv av Grant, og kallar hann sín lærumeistara, og heldur fast við, at uttan Grant var hann ikki komin langt á sínari leið sum yrkisleikari. Beint øvugt heldur Eyal Berkovic, at framferðarhættirnir hjá Grant ímóti leikarunum eru skelkandi og uttan nakra virðing yvirfyri leikarunum.

Nøkur fá Chelsea-viðhaldsfólk mótmæltu við rasistiskum og anti-semitiskum rakstrarrópum, tá Avram Grant setti seg í sessin hjá José Mourinho. Men eins og pápin Meir, so er Avram Grant ein yvirlivari, á stillan hátt hevur hann vunnið virðingina hjá leikarunum og viðhaldsfólkunum.



*Tað vóru mong í Chelsea, sum ivaðust, tá Avram Grant tók leysa venjarasessin í felagnum. Men higar til hevur hann vunnið virðingina frá bæði*

## Punkteraður spenningur

Kappingin hjá monnum tykist mest vera ein spurningur um at fáa tíðina at ganga fram til FM-finalurnar. Tey flestu høvdu annars roknað við einum ordans grannabraki sunnudagin. Men tó at Kyndil enn hevur møguleikan, so má hesin nú sigast at vera av meira teoretiskum slag. Stórsigurin hjá Neistanum afturi í oktober mánaði ger nevnliga, at Kyndil skal vinna við 13 málum, skulu teir vera betri í innanhýsis roknskapinum. Og alt annað líka, so er tað ein uppgáva, ið er mest sum ov møtumikil hjá teimum grønu, ið tó ivaleyst vilja berjast fyri sínum møguleika.

Dystir eru tó eisini í Kollafirði og í Hoyvík. KÍF spælir grannauppgerð móti VÍF, og tó at hesin dysturin ikki broytir stórvegis um stigatalvuna, so plagar hetta at vera nakað, sum spælararnir hjá báðum liðum vilja stríðast fyri.

Og í Hoyvík tekur H71 móti oddaliðnum StÍF, sum langt síðani hevur vissað sær sæti í finaluni. Talan er tó um seinasta heimadystin hjá H71 hetta kappingarárið, og tí vilja teir helst enda við manér framman fyri heimaáskoðarunum.

**-mørk**

# Tvær próvtøkur eftir

**Neistakvinnurnar vunnu sær fyrimun móti VB seinasta vikuskiftið. Men talan er aftur um stóra próvtøku móti Kyndli, sum hevur vunnið tríggjar tær seinastu innanhýsis uppgerðirnar**

HONDBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað er kvinnudysturin á Hálsi, sum fokus er vent ímóti sunnudagin.

Hjá bæði Neista- og Kyndilsáskoðarunum var spenningurin annars sera stórur um mansdystin, men tá Kyndil snávaði móti H71, hvarv tann spenningurin líkasum.



*Kyndilskvinnur hava vunnið tríggjar tær seinastu uppgerðirnar móti Neistanum. Og nú hava tær møguleika til veruliga at slá fast, at hóast Neistin er ovari á stigatalvuni, er Kyndil best í høvuðsstaðnum hetta kappingarárið*

Og tí er tað nú fyrst og fremst kvinnurnar, sum tað snýr seg um. Ikki tí at Kyndil her kann røkka so øgiliga nógv meira enn finaluplássinum í steypakappingini, sum nú er av. Heldur er spurningurin, um Kyndil enn einaferð kann geva VB eina hjálpandi hond, soleiðis sum tær hava gjørt tað tær báðar seinastu ferðirnar, at tær hava spælt móti Neistanum.

Verður uppgerðin í steypakappingini roknað við. So hevur Kyndil nú vunnið tríggjar dystir á rað móti Neistanum. Og vinna tær fjórðu ferðina á rað eisini, munnu tær hava skrivað sín part av hondbóltssøguni á kvinnusíðuni hjá Kyndli.

Og Neistin hevur alt at spæla fyri. Sigrar nú sunnudagin og í seinasta dystinum móti StÍF eru krav, um vinnast skal fram til FM-finaluna. Seinastu dystirnar hevur Neistin eisini fingið glið á, og tí eru útlitini fyri sigrinum kanska betri nú, enn tær vóru til seinasta uppgerðina. Og uttan iva vilja tær bláu eisini staðfesta, at tær enn skulu roknast sum sterkasta kvinnuliðið í høvuðsstaðnum.

Í hinum báðum dystunum hjá kvinnum er talan um greiðar favoritt-leiklutir. Stjørnan hevur heimavøll móti StÍF, og VB hevur heimavøll móti longu niðurflutta VÍF.

## Dystir um vikuskiftið

### Hondbóltur

Sunset-kappingin

| | | |
|---|---|---|
| 09.03 | 14.30 | Neistin-Kyndil |
| 09.03 | 15.00 | Stjørnan-StÍF |
| 09.03 | 15.00 | VB-VÍF |

### Atlantic Airways-kappingin

| | | |
|---|---|---|
| 09.03 | 16.00 | Neistin-Kyndil |
| 09.03 | 16.00 | KÍF-VÍF |
| 09.03 | 16.00 | H71-StÍF |

### Flogbóltur

Meistaradeild kvinnur

| | | |
|---|---|---|
| 08.03 | 14.00 | ÍF-Fleyr |
| 08.03 | 14.00 | KÍF-SÍ |
| 09.03 | 14.00 | Dráttur-Mjølnir |

Meistaradeild menn

| | | |
|---|---|---|
| 08.03 | 16.00 | ÍF-Fleyr |
| 08.03 | 16.00 | SÍ-Mjølnir |